

## Køksfólk

Dagstovnurin í Løkjatúni søkir eftir einum køksfólki at arbeiða 15 tímar um vikuna at byrja skjótast tilber. Arbeiðstíðin er millum kl. 10.00-12.00.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Steinbjørn V. Olsen, stovnsleiðara, tlf. 302390/214227.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum í Løkjatúni, Løkjatún 5, 160 Argir, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. september 2007.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

## Okkara lega 2006

Heimamissiónin bjóðar rørslu- og menningartarnaðum o.ø., saman við avvarandi á legur í Nesvík

Seinasta freist at tekna seg er 8. september.
Send seðilin til:

Kirkjuliga Heimamissiónin
FO-437 Nesvík

Eisini kann ringjast til:
Nesvíkar á tlf. 470000, Karen á tlf. 448335
ella til Marjun á tlf. 447147

***Lega 1** er frá 14. - 16. sept.*
***Lega 2** er frá 21. - 23. sept.*







# BARNA-OLYMPIADA
## & Evangeliskt møti
## í Ítróttarhøllini í Klaksvík

---

**Sunnudagin kl: 1400**
skipar sunnudagsskúlin fyri **Barna-OL**

**Sunnukvøldið kl: 1900**
Evangeliskt møti.

VITIN og aðrir syngja.
Rógvi Joensen og aðrir tala

Ein kaffimunnur verður aftaná

**Øll eru hjartaliga vælkomin.**
Samkoman í Betesda

Starvslýsing

Heimatænastan

## Endurlýsing eftir heilsustarvsfólki til dagumlætting fyri minnisveik

Henda endurlýsing er orsaka av skeivari umsóknarfreist í lýsing frammanundan.

Eitt tíðaravmarkað starv er leyst at søkja frá 1. oktober 2007 til 31. desember 2007 við møguleika fyri at halda fram í 2008 um verkætlanin eydnast.

Avgjørt er at seta eina verkætlan í gongd í Ítriv á Norðoya Røktarheimi. Pláss verður fyri umleið 8 heimabúgvandi minnisveikum fólkum til dagumlætting. Umlættingin skal virka frá kl.9.00 til 17.00 allar yrkadagar.

Tað er ynskiligt, at viðkomandi hevur kunnleika og møguliga royndir innan økið. Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, brennur fyri økinum, er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum, vil mennast fakliga og er opin fyri nýhugsan. Arbeiðið fevnir um at skipa gerandisdagin, soleiðis at bæði heimabúgvandi og búfólk á Røktarheiminum fáa nyttu av tiltakinum.

**Setanartreytir:**
Arbeiðstíðin verður minimum 30 tímar um vikuna.
Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðið er í løtuni á Røktarheiminum.
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Elsbu Lützen, leiðara, á tlf. 457610, 457243 ella 222783.

**Umsókn:**
Umsókn við hjáløgdum prógvskjølum, viðmælum og c.v. skal sendast til:

**Norðoya Røktarheim**
Stílað: Elsba Lützen
Víkavegur
700 Klaksvík

**Umsóknarfreist: 14. september 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

---

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!